## Leita eftir føroyskum spælarum

Svenska flogbóltsfelagið, Svedala Volley, roynir umvegis heimasíðuna hjá Flogbóltssambandinum at fáa fatur á føroyskum spælarum til kvinnulið sítt. Felagið sigur seg sóknast eftir mið- og kantspælara, sum kann vera partur av liðnum fyrsta ársfjórðingin í 2009. Talan verður ikki um tann heilt stóra sáttmálan, men felagið sigur seg vera til reiðar at rinda fyri ferðing, íbúð og at geva nakað av lummapeningi, sum tikið verður til.



## Móti Grønlandi í januar

Føroysku hondbóltsharrarnir fáa eina nýggja avbjóðing longu í januar mánaði. Grønlendska hondbóltslandsliðið hevur nevnliga gjørt av, at teirra næsta venjingarlega verður í Føroyum, og millum annað verður ein landsdystur móti Føroyum á skránni. Og hesin verður altso tann 21. januar. Føroyar og Grønland spældu eisini venjingardystir í Føroyum í 2000, tá talan varð um tveir sera spennandi dystir.

Neistin-StÍF 30-24 (15-11):

# Neistin heldur í línuni

**Neistakvinnur gjørdu sítt arbeiði, tá tær fingu óvæntaðan møguleika at minka um munin upp til oddaliðini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tíðarskjótingin millum dystirnar bar við sær, at Neistakvinnur vóru varugar við, at ein hjálpandi hond frá Tjaldri var í væntu leygardagin.

Sjálvar skuldu tær bláu tó savna seg um uppgávuna móti StÍF, og hesa loystu tær eisini uttan tað heilt stóra hóvastákið.

Fyrsta stóra partin av dystinum fylgdi StÍF tó hampuliga væl við, men undan steðginum kom spakuliga eitt hol ímillum liðini.

StÍF royndi alla tíðina at tippa holið aftur, men seinastu tíggju minuttirnar fekk Neistin veruliga beint allan iva til viks, soleiðis at talan kortini gjørdist um ein sigur av teimum hampuliga tryggu.

Við sigrinum fekk Neistin minkað um munin upp til VB, sum er á øðrum plássi í kappingini, men við fimm stigum upp skal hampuliga nógv henda, um Neistin aftur í ár skal vinna seg fram til FM-finaluna.

StÍF er í sínum lagi ikki heilt leyst av niðurflytingarvandanum. Men munurin niður til Kyndil er framvegis fýra stig, og tí er lítið sannlíkt, at tær enda árið á aftasta plássinum.



*Neistakvinnurnar hava ikki heilt slept takinum. Og tá VB snávaði í Runavík, megnaðu tær bláu at gera sítt heimaarbeiði til lítar*

*savnsmynd*

### FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-StÍF 30-24 (15-11)**
**10 min:** 5-5
**20 min:** 10-7
**40 min:** 22-16
**50 min:** 23-21

**Málskjúttar**
**Neistin:** Trine Mayland 6(2), Stine Mikkelsen 6, Unn Kragesteen 3, Nicoleta Radu Hansen 3, Anja Heinadóttir 3, Tordis Tróndarson 3, Heidi Maria Akselsen 2, Elin Staksund 2, Rakul Augustinussen 1
**StÍF:** Bára Berthelsen 7, Rebekka Justinussen 7(1), Ninna K. Johansen 5, Fríðrunn Danielsen 2, Sunfríð Johansen 1, Anna Petersen 1, Rósa Johansen 1
**Brotskøst:**
Neistin 2, StÍF 1
**Útvísingar:**
StÍF 1
**Dómarar:**
Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen


Frá Føroya Shell

Shellstøðirnar hava opið soleiðis um høgtíðirnar:

| | | |
|---|---|---|
| Jólaaftan | 24. desembur | 08.00 – 15.00 |
| 1. jóladag | 25. desembur | stongt |
| 2. jóladag | 26. desembur | 08.00 – 23.00 |
| Leygardagin | 27. desembur | 08.00 – 23.00 |
| Nýggjársaftan | 31. desembur | 08.00 – 16.00 |
| Nýggjársdag | 1. januar | stongt |
| Fríggjadagur | 2. januar | 07.00 23.00 |

Shellstøðirnar í Klaksvík, Gøtudali, á Frælsinum og við Ringvegin

Føroya Shell
Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn
Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo


# Lønarveitslan av

**Næsta staðfestingin av fíggjarkreppuni í føroyskum fótbólti kom úr Klaksvík. Men kanska eru kreppurópini bara tiltrongdur heilsubati til føroyskan fótbólti**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Orðafellið um væntaðar skriðjur fekk enn eina staðfesting at stuðla seg til, tá KÍ um vikuskiftið boðaði frá, at teir ikki høvdu ráð at halda Rógva Jacobsen í hópinum.

Fagnaðurin var annars øgiligur, tá klaksvíkingar í summar kundu boða frá, at teir nú høvdu kanska vandamesta føroyska áleyparan seinnu árini við aftur í hópinum.

Ikki minst fegnaðust viðhaldsfólkini eisini um, at talan var um trý-ára sáttmála, heldur enn at talan varð um hesar keðiliga eitt-ára sáttmálarnir, sum tíverri hava lyndi til at vera reglan heldur enn undantakið í føroyskum fótbólti.

Ein orsøk til júst hetta fyribrigdi er, at spælararnir ár eftir ár hava roynt at kroyst lønarsitrónina. Forrestin púrasta skilligt, tá feløgini hava staðið í bíðirøð at kappbjóða upp á sjálvt hálvvánaligar spælarar.

Men seinastu útmeldingarnar boða púrasta greitt frá, at tann parturin av lønarveitsluni eisini er av. Higar til hava B36 og KÍ meldað greitt út, at tey hava ikki fíggjarliga orku at spæla við í hesum partinum av spælinum, og hóast útmeldingar ikki eru komnar frá øðrum av Formula-kappingarneytunum, so er neyvan nakar ivi um, at støðan er so púrasta tann sama hjá flestu av hesum.

Treiskar leysasølur um vantandi lønargjaldingar, eftirstøður fyri íbúðir og aðrar veitingar hómast og hoyrast í krókunum, og við einum víkjandi inntøkugrundarlagið er lítið sannlíkt, at feløgini nú megna at røkja tær skyldur, sum tey ikki megnaðu at røkja í góðu tíðunum.

Hinvegin nýtist tað nú ikki at vera so heilt øgiliga ringt, at veitslan er av. Bestu ballini eru ofta tey, sum ikki eru so øgiliga høgt stílað, men har heimligur hugni heldur er á skránni. Og lærupeningurin hjá føroysku fótbóltsfeløgunum fyri seinnu árini er helst, at tey nú í nógv størri mun verða noydd at hjúkla um segið tilfeingi. Og gera tey hetta á munagóðan hátt, kann verandi kreppan væl vísa seg sum nakað av tí heilsubesta, sum er hent føroyskum fótbólti.

Jólini standa fyri framman, so saman við dunnu, røstum kjøti og rísgreytti er bara eftir at siga: væl gagnist!